# Listin er okkara galliónsfigurur



Mentanarnáttina 5. juni 2009 hevur Rannvá Holm Mortensen myndlistaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Opið er kl 16:00-23:00 og framsýningin heldur fram eftir Mentanarnáttina.

- Fyri meg er listin eitt amboð at úttrykkja kenslur og hugsanir við, sigur Rannvá og leggur afturat at listin er enntá eitt vápn, gerst tað neyðugt.

- Ein málningur kann vera spontanur og ekspressivur, men hann kann eisini vera ein vælfyrireikað verkætlan, sum tænir einum ávísum endamáli, sigur listarkvinnan Rannvá Holm Mortensen.

- Tað kann snúgva seg um eina politiska hending, kanska eina erotiska lýsing ella eina religiøsa kenslu. Listin eigur evnini at transformera gerandisdagin yvir í ein nýggjan veruleika, men listin kappast ikki við veruleikan. Gjørdi hon tað, so var hon tann treytaleysi taparin, sigur Rannvá.

- Man transformerar tað, sum ein er góður við ella tað sum man hatar, yvir í ein nýggjan, paralellan veruleika. Men hesin veruleiki fer ikki neyðugvís uppí eina hægri dialektiska eind. Kanska vendur listaverkið dialektikkinum bakið, og fer óvæntaðar og púra nýggjar leiðir. Men kenst myndin á sín egna hátt sjálvstøðug og sonn, tekur áskoðarin hana til sín.Tá gerst listin knappliga týdningarmikil og livir upp til sítt renommé,sum menniskjans andaligi galliónsfigurur.

At arbeiða við list gevur tær stórt frælsi.Tú fer inn í ein dialog við áskoðaran, og sum fráliður tilleggur áskoðarin verkinum sínar persónligu dimensjónir og fasettir. Soleiðis livir listaverkið sítt egna sjálvstøðuga lív. Listin stevnir føgur og sterk tvørturum landa- og havmørk, og óansæð húðarlit, religión ella politiska hugsjón, verður man fyltur av nøgdsemi, tá galliónsfigururin sæst í havsbrúnni. Listin rørir okkum, tølir og sameinir okkum. Hon vísir okkum, at vit grundleggjandi eru individ við somu kenslum,longslum og dreymum.

Vælkomin til listaframsýning hjá Rannvá Holm Mortensen í Smiðjuni í Lítluvík Mentanarnáttina 5. juni 2009 kl 16:00.23:00. Framsýningin heldur fram eftir Mentanarnáttina.


VÆLKOMIN TIL GJÁARGARÐ



GJÁARGARÐUR Guesthouse of Gjógv
Tel. (+298) 423171
Mob. (+298) 211590
info@gjaargardur.fo
www.gjaargardur.fo

Skeltir



BSV Har vitan og handverk sameinast
P/F Bygningssnikkaravirkið
Smyrilsvegur 4 · Postsmoga 1087
FO-110 Tórshavn · Tel: 31 25 87
bsv@bsv.fo · www.bsv.fo

SUMMARSKÁL



Sí uppskriftir á www.mbm.fo undir »Mjólkavirkið«

MBM

Sony myndatól
DSC-S950
Vanl. prísur 1.195,-
995,-
200,- spar



Tunt og lætt snið. 10,1 mega pixel og eitt objektiv við 4x optiskum zoom. Sera brúkaravinarligt og við 2,7" stórum skermi.

Sony upptøkutól
DCR-SX30
2.495,-
NÝTT



Sera einfalt upptøkutól við innbygdum minni á næstan 3 tímar. Tekur eisini uppá MemoryStick. 60x optiskt zoom og 2000x digitalt zoom.

Sony speglrefleks myndatól
DSLR-A200K
-Super SteadyShot
-2,7" LCD skíggi
-Antistøv- skipan
-við 18-70mm linsu
3.995,-
10,2 megapixels



HANDILIN
tel. 351220 - www.lm.fo - lm@lm.fo